Nólsoyar Pálsgøta 32
700 Klaksvík
Tlf. 410000 Fax 410001

Ár 2013, hin 29. januar kl. 17:30 hevði Klaksvíkar Býráð fund, har hesir limir møttu:
Jógvan Skorheim, Steinbjørn O. Jacobsen, Óluva Klettskarð, Jóhann Lützen, Signhild V. Johannesen, Kristian Eli Zachariasen, Gunvá við Keldu, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, Eyðstein Ó. Poulsen, Atli S. Justinussen og Herfrí J. Sørensen.

2013/011.
12/01162 Fyrsti býráðsfundur, val og skipan av nevndum v.m., 2013-2016

Frágreiðing um málið:
Á býráðsfundinum 20. des. 2012 vórðu føstu almennu býráðsfundardagarnir ásettir. Borgarstjórin hevur tó biðið um at fáa málið viðgjørt av býráðnum av nýggjum, so býráðslimirnir hava enn ein møguleika at gera viðmerkingar til og endaliga staðfesta, nær fundirnir fyri árið 2013 skulu verða.

Býráðsins samtykt:
Samtykt at fundirnir verða hesar dagar í 2013:

21. februar	19. september
21. mars	24. oktober
25. apríl	21. november
23. mai	12. desember
20. juni	

2013/012.
12/01162 Val av limum í valnevnd til býráðsval í Klaksvíkar Kommunu, 2013-2016

Frágreiðing um málið:
Sambært §3 í kommunuvallógini verða kommunustýrisval ”fyrireikað og fyriskipað undir leiðslu av eini valnevnd, sum sett er av bygdaráðnum/býráðnum. Nevndin hevur í minsta lagi 3 limir og skipar seg sjálv. Nevndin situr sama tíðarskeið sum bygdaráðið/býráðið”.

Mælt verður til at velja 4 limir.

Býráðsins samtykt:
1. Svanhild Isaksen
2. Maria Isaksen
3. Sunniva Berg Jacobsen
4. Petur í Gong

2013/013.
12/01162 Val av limum í valstýrið fyri býráðs, løgtings- og fólkatingsval, 2013-2016

Frágreiðing um málið:
Sambært §8, stk. 3, í kommunuvallógini ”*verður í kommunum við fleiri atkvøðuøkjum sett serligt stýri við valstýrarum fyri hvørt økið at stíla fyri valinum har. Hesi valstýri verða sett av bygdaráðnum/býráðnum eftir vanligum reglum fyri val av nevndum (lutfalsvalháttur). Valstýrið, sum skal hava í minsta lagi 3, í mesta lagi 9 limir, skipar seg sjálvt. Eingin veljari kann bera seg undan vali til valstýrara, uttan so at hann hevur lógligt forfall*”.

Løgingsvallógin ásetur í §20, at ”atkvøðugreiðslan á hvørjum valstaði verður fyriskipað undir leiðslu av einum valstýri, sum sett er av bygdaráðnum/býráðnum. … Stýrið hevur í minsta lagi 3 og hægst 5 limir og skipar seg sjálvt”.
Fólkatingsvallógin ásetur í §19, at ”*senest når valg er udskrevet, vælger kommunalbestyrelsen for hvert valgdistrikt mindst 3 og højst 5 valgstyrere til at forestå afstemningen og stemmeoptællingen på valgstedet*”.

Mælt verður til at velja 5 limir.

Býráðsins samtykt:
1. Karl Johansen
2. Jabjørt Thomsen
3. Eydna Thomsen
4. Paulina Andreasen
5. Jógvan Svabo Samuelsen

2013/014.
12/01162 Val av limum í valstýrið fyri atkvøðuøkið Mikladalur og Trøllanes, 2013-2016

Frágreiðing um málið:
Sambært §8, stk. 3, í kommunuvallógini ”*verður í kommunum við fleiri atkvøðuøkjum sett serligt stýri við valstýrarum fyri hvørt økið at stíla fyri valinum har. Hesi valstýri verða sett av bygdaráðnum / býráðnum eftir vanligum reglum fyri val av nevndum (lutfalsvalháttur). Valstýrið, sum skal hava í minsta lagi 3, í mesta lagi 9 limir, skipar seg sjálvt. Eingin veljari kann bera seg undan vali til valstýrara, uttan so at hann hevur lógligt forfall*”.

Mælt verður til at velja 3 limir og 1 varalim.

Býráðsins samtykt:
1. Jógvan Joensen
2. Jóan Hendrik Hendriksen
3. Dánial Eliassen

Varalimur:
1. Anja Eliasen

2013/015.
12/01162 Val av limum í valstýrið fyri atkvøðuøkið Árnafjørður, 2013-2016

Frágreiðing um málið:
Sambært §8, stk. 3, í kommunuvallógini ”*verður í kommunum við fleiri atkvøðuøkjum sett serligt stýri við valstýrarum fyri hvørt økið at stíla fyri valinum har. Hesi valstýri verða sett av bygdaráðnum / býráðnum eftir vanligum reglum fyri val av nevndum (lutfalsvalháttur). Valstýrið, sum skal hava í minsta lagi 3, í mesta lagi 9 limir, skipar seg sjálvt. Eingin veljari kann bera seg undan vali til valstýrara, uttan so at hann hevur lógligt forfall*”.

Mælt verður til at velja 3 ella 4 limir.

Býráðsins samtykt:

1. Guttorm F. Pállson
2. Theodor A. Olsen
3. Charlotta Thorsteinsson
4. Regin Hansen (varalimur)

2013/016.
12/01162 Val av limum í valstýrið fyri atkvøðuøkið Svínoy, 2013-2016

Frágreiðing um málið:
Sambært §8, stk. 3, í kommunuvallógini "*verður í kommunum við fleiri atkvøðuøkjum sett serligt stýri við valstýrarum fyri hvørt økið at stíla fyri valinum har. Hesi valstýri verða sett av bygdaráðnum / býráðnum eftir vanligum reglum fyri val av nevndum (lutfalsvalháttur). Valstýrið, sum skal hava í minsta lagi 3, í mesta lagi 9 limir, skipar seg sjálvt. Eingin veljari kann bera seg undan vali til valstýrara, uttan so at hann hevur lógligt forfall*".

Mælt verður til at velja 3 limir og 1 varalim.

Býráðsins samtykt:
Limir:
1. Hanna Jacobsen
2. Petur Danielsen
3. Óli í Geilini
4. Símun Hansen (varalimur)

2013/017.
12/01162 Val av limum og tiltakslimum í barnaverndarnevndina, 2013-2016

Frágreiðing um málið:
Við heimild í nýggju barnaverndarlógini er gjørd ein samstarvsavtala millum allar kommunur í Norðoyggjum.
Nevndin hevur 5 limir og verður vald av nýggjum eftir hvørt kommunuval. Býtið av limum er hetta:
- Viðareiðis Kommuna velur 1 lim og Fugloyar Kommuna velur 1 varalim
- Hvannasunds Kommuna velur 1 lim og 1 varalim
- Kunoyar Kommuna velur 1 lim og Húsa Kommuna velur 1 varalim
- Klaksvíkar Kommuna velur 2 limir og 2 varalimir

Býráðsins samtykt:
Limir:
1. Rúna Sivertsen
2. Harriet Hvidbro

Tiltakslimir:
1. Jóngerð Biskopstø
2. Vónbjørt Gudjónsson

2013/018.
12/01162 Val av limum í ferðslunevnd býráðsins, 2013-2016

Frágreiðing um málið:
Sambært kommunustýrisskipanini, dagførd 18. mai 2010: "*Ferðslunevndin, sum er ein faknevnd innan tekniska málsøkið, er mannað við trimum limum og verður vald á fyrsta býráðsfundi eftir hvørt*

býráðsval við einum umboð fyri býráðið (býráðslimur), einum umboð fyri Teknisku Umsiting og einum umboð fyri løgregluna".

Sostatt skal politistøðin velja ein lim, Tekniska Deild kommununnar velja ein lim og býráðið ein lim. Vanliga er tað býráðið, sum staðfestir nøvnini á teimum, ið skulu manna nevndina í komandi valskeiði.

Sostatt skulu veljast 3 limir.

Býráðsins samtykt:
1. Steinbjørn O. Jacobsen, umboð fyri býráðið
2. Kári Thorsteinsson, umboð fyri løgregluna
3. Gunnleyg K. Dánjalsson, umboð fyri teknisku umsiting

2013/019.
12/01162 Val av limum í brunanevnd býráðsins, 2013-2016

Frágreiðing um málið:
Kommunustýrisskipan býráðsins, §33, 1. petti, ásetur, at "*Brunanevndin hevur 5 limir. Í brunanevndini sita borgarstjórin, leiðarin fyri sløkkiliðnum, sýslumaðurin og 2 limir, tilnevndir av býráðnum, harav í hvussu er annar skal vera býráðslimur"*.

Sostatt skulu veljast 2 limir, harav annar skal vera býráðslimur.

Býráðsins samtykt:
1. Herfrí J. Sørensen, býráðslimur
2. Louis Juliusson, umboð fyri býráðið

2013/020.
12/01162 Val av limum í gøtunavnanevnd býráðsins, 2013-2016

Frágreiðing um málið:
Kommunustýrisskipan býráðsins, §34, 2. petti, ásetur, at "*Gøtunavnanevndin hevur 3 fastar limir, ið verða valdir av býráðnum fyri eitt 4 ára skeið í senn aftan á hvørt býráðsval*".

Sostatt skulu veljast 3 limir.

Býráðsins samtykt:
1. Finn Kjølbro
2. Paulina Andreasen
3. Jógvan Ravnsfjall

2013/021.
12/01162 Val av limum í kirkjugarðsnevndina 2013-2016

Frágreiðing um málið:

Reglugerðin fyri kirkjugarðarnar í Klaksvíkar Kommunu, §2, sigur m.a., at í kirkjugarðsnevndini sita 5 limir; kirkjuráðið í Klaksvík velur 2 limir, og býráðið velur 3 limir. Valskeiðið er 4 ár og fylgir býráðsskeiðinum. Nevndin skipar seg sjálv.

Sostatt skal býráðið velja 3 limir.

Býráðsins samtykt:
1. Jákup Ziskason
2. Petur J. Jacobsen
3. Hans Hjalti Skaale

2013/022.
12/01162 Val av limum í hegnsýnisnevnd/ir í kommununi 2013-2016.

Frágreiðing um málið:
Eftir kommunusamanleggina við Mikladals og Svínoyar Kommunur, sum hevur viðført at fleiri bygdir eru í kommununi, samtykti býráðið at seta eina felags hegnsýnisnevnd fyri alla kommununa við umboðum fyri allar viðkomandi bygdir, hetta fyri at umgangast ógegni.

Av tí at tað at her er talan um eitt øki, ið krevur servitan, verður mælt til at velja somu limir í nevndina – eyðvitað treytað av, at menn taka við afturvali. Sostatt skal býráðið velja 3 limir og 3 varalimir.

Býráðsins samtykt:

Limir:	Varalimir:
1. Kristmar Andreasen	1. Anja Eliasen
2. Eyðun Jacobsen	2. Mikkjal Mikkelsen
3. Andras Joensen	3. Jógvan A. Sørensen

2013/023.
12/01162 Val av býráðsumboði og varaumboði í staðbundnu nevndina fyri Árnafjørð, 2013-2016

Frágreiðing um málið:
Sambært kommunustýrisskipan býráðsins, §30, verður vald ein nevnd við 5 limum at taka sær av áhugamálum í Árnafirði. Tríggir av limunum verða valdir og millum borgararnar í Árnafirði eftir reglunum í kommunalu vallógini. Ein limur verður valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður.

Sostatt skal býráðið velja 1 lim aftur at borgarstjóranum, (sum við verandi valbólkum í býráðnum fellur til minnilutan, tí hóast borgarstjórin er føddur limur og formaður, skal hann sambært §28, stk. 3, í kommunustýrislógini teljast við upp í sessatalið, sum valbólkur hansara hevur rætt at ogna sær).

Sostatt skal veljast ein limur og ein varalimur í nevndina umframt borgarstjóran.

Býráðsins samtykt:

Limur:	Varalimur:
1. Atli S. Justinussen	1. Gunvá við Keldu

2013/024.
12/01162 Val av býráðsumboði og varaumboði í staðbundnu nevndina fyri Mikladal, 2013-2016

Frágreiðing um málið:
Í samtykta sáttmálanum um samanlegging av Klaksvíkar og Mikladals kommunu, § 11, er ásett, at "*Partarnir eru samdir um, í samband við samanleggingina, at seta tvær staðbundnar nevndir samsvarandi §37 í Kommunustýrislógini, at ráðgeva og ummæla í málum viðvíkjandi staðbundnum viðurskiftum.*
Valdar verða nevndir, ein fyri Mikladal, nevnd Mikladalsnevndin, og ein fyri Trøllanes, nevnd Trøllanesnevndin, sum hvør hevur 5 limir. Bygdarfólkið velur 3 limir fyri 4 ár, tá kommunuval er; borgarstjórin er nevndarformaður, býráðið velur hin limin".

Sostatt skal býráðið velja 1 lim aftur at borgarstjóranum, (sum við verandi valbólkum í býráðnum fellur til minnilutan, tí hóast borgarstjórin er føddur limur og formaður, skal hann sambært §28, stk. 3, í kommunustýrislógini teljast við upp í sessatalið, sum valbólkur hansara hevur rætt at ogna sær).

Sostatt skal veljast ein limur og ein varalimur í nevndina umframt borgarstjóran.

Býráðsins samtykt:

Limur:	Varalimur:
1. Herfrí J. Sørensen	1. Eyðstein Ó. Poulsen

2013/025.
12/01162 Val av býráðsumboði og varaumboði í staðbundnu nevndina fyri Svínoy, 2013-2016

Frágreiðing um málið:
Í samtykta sáttmálanum um samanlegging av Klaksvíkar og Svínoyar kommunu, er ásett, í §11, "*partarnir eru samdir um, í samband við samanleggingina, at seta staðbundna nevnd samsvarandi § 37 í Kommunustýrislógini, at ráðgeva og ummæla í málum viðvíkjandi staðbundnum viðurskiftum.*
Vald verður ein nevnd fyri Svínoy, nevnd Svínoyarnevndin, sum hevur 5 limir.
Bygdarfólkið velur 3 limir fyri 4 ár, tá kommunuval er; borgarstjórin er nevndarformaður, býráðið velur hin limin."

Sostatt skal býráðið velja 1 lim aftur at borgarstjóranum, (sum við verandi valbólkum í býráðnum fellur til minnilutan, tí hóast borgarstjórin er føddur limur og formaður, skal hann sambært §28, stk. 3, í kommunustýrislógini teljast við upp í sessatalið, sum valbólkur hansara hevur rætt at ogna sær).

Sostatt skal veljast ein limur og ein varalimur í nevndina umframt borgarstjóran.

Býráðsins samtykt:

Limur:	Varalimur:
1. Eyðstein Ó. Poulsen	1. Atli S. Justinussen

2013/026.
12/01162 Val av býráðsumboði og varaumboði í staðbundnu nevndina fyri Norðoyri, 2013-2016

Frágreiðing um málið:

Týsdagin 11. mai 2010 varð fyri fyrstu ferð skipað fyri vali til Staðbundnu Nevndina fyri Norðoyri, sum er sett á stovn við sama endamáli sum staðbundnu nevndirnar fyri aðrar bygdir í kommununi.

§ 34 í Kommunustýrisskipanini er soljóðandi:
Norðoyrarnevndin
1. petti. At taka sær av áhugamálum í Norðoyri verður vald ein nevnd við 5 limum. Tríggir valdir av og millum borgararnar í Norðoyri eftir reglunum í kommunalu vallógini. Valbæri og valrætt hava tey, sum hava valrætt og eru valbær til býráðið. Ein valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður.
2. petti. Mál, sum býráðið metir at hava serligan áhuga fyri Norðoyri, verða send nevndini til ummælis, sum innan ein mánað, vegleiðir, umrøður og ger tilmæli.

Sostatt skal býráðið velja 1 lim aftur at borgarstjóranum, (sum við verandi valbólkum í býráðnum fellur til minnilutan, tí hóast borgarstjórin er føddur limur og formaður, skal hann sambært §28, stk. 3, í kommunustýrislógini teljast við upp í sessatalið, sum valbólkur hansara hevur rætt at ogna sær).

Sostatt skal veljast ein limur og ein varalimur í nevndina umframt borgarstjóran.

Býráðsins samtykt:

Limur:	Varalimur:
1. Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur	1. Herfrí J. Sørensen

2013/027.
<u>12/01162 Val av limum í nevndina fyri Sjálvsognarstovnin undir Kráarbrekku, 2013-2016</u>

<u>Frágreiðing um málið:</u>
Víst verður til býráðsmál nr. 1 í 2005 (j. nr. 2005-19-006) um góðkenning av broyting av viðtøkunum fyri sjálvsognarstovnin "Undir Kráarbrekku", har nevndin hevur samtykt at broyta viðtøkurnar fyri stovnin.
Í hesum sambandi er avtalað, at Klaksvíkar Býráð skal hava 3 limir (hevði frammanundan 1 lim), samstundis sum Vistarheimsnevndin missir báðar sínar limir. Annars óbroytt samanseting.

Sostatt skal býráðið velja 3 limir og 3 varalimir í nevndina.

Býráðsins samtykt:

Limur:	Varalimur:
1. Jógvan Skorheim	1. Steinbjørn O. Jacobsen
2. Óluva Klettskarð	2. Kristian Eli Zachariasen
3. Gunvá við Keldu	3. Herfrí J. Sørensen

2013/028.
<u>12/01162 Val av limum og varalimum í stýrið fyri Sambýlið á Heygnum, 2013-2016</u>

<u>Frágreiðing um málið:</u>
Í reglugerðini fyri Sambýlið á Heygnum er m.a. ásett í §3, at "*Heimið verður stjórnað av einum stýri við 3 limum, ið allir verða valdir av Klaksvíkar Býráð. Stýrislimirnir verða valdir fyri eitt 4 ára skeið aftan á hvørt býráðsval. Stýrið skipar seg sjálvt við formanni og næstformanni. Býráðið ger av, um*

stýrislimir fáa samsýning. Stk. 2. Fyri hvønn stýrislim verður valdur ein varalimur, ið tekur sæti í stýrinum, tá viðkomandi stýrislimi berst frá".

Sostatt skal býráðið velja 3 limir og 3 varalimir.

Býráðsins samtykt:

Limir:		Varalimir:	
1.	Karl Marius Poulsen	1.	Eyð Matras
2.	Kári Sigurðsson	2.	Sven Dahl
3.	Annika Johansen	3.	Hallstein Jacobsen

2013/029.
12/01162 Val av limum og varalimum í stýrið fyri Sambýlið í Bøgøtu, 2013-2016

Frágreiðing um málið:
Í viðtøkunum fyri kommunala "Sambýlið í Bøgøtu" er m.a. ásett í §3, at "*Heimið verður stjórnað av einum stýri við 3 limum, ið allir verða valdir av Klaksvíkar Býráð. Stýrislimirnir verða valdir fyri eitt 4 ára skeið. Stýrið skipar seg sjálvt við formanni og næstformanni. Býráðið avger, um stýrislimir fáa samsýning. Fyri hvønn stýrislim verður valdur ein varalimur, ið tekur sæti í stýrinum, tá viðkomandi stýrislimi berst frá".*

Sostatt skal býráðið velja 3 limir og 3 varalimir.

Býráðsins samtykt:

Limir:		Varalimir:	
1.	Schumann Hansen	1.	Tummas Lervig
2.	Hergerð Joensen	2.	Asta Poulsen
3.	Erik Andreasen	3.	Bjørg Sørensen

2013/030.
12/01162 Val av limi og varalimi í stýrið fyri Umlættingarheimið Dáan, 2013-2016

Frágreiðing um málið:
Viðtøkurnar fyri Umlættingarheimið Dáan við Bøgøtu ásetur m.a. í §3, at "*ovasta leiðsla fyri heimið er eitt trímannastýri, ið verður valt soleiðis: (a) Føroya Landsstýri velur ein lim, (b) "Javni – Landsfelagið evnaveikum at bata" velur ein lim, (c) Klaksvíkar Býráð velur ein lim. Stk. 2: Fyri hvønn stýrislim verður valdur ein varalimur.*

Sostatt skal býráðið velja ein lim og ein varalim í stýrið.

Býráðsins samtykt:

Limur:		Varalimur:	
1.	Petur Martin Hansen	1.	Margee Dam

2013/031.
12/01162 Val av limum og varalimum í stýrið fyri Sjálvsognarstovnin Norðoya Røktarheim, 2013-2016

Frágreiðing um málið:
Í reglugerðini fyri sjálvsognarstovnin Norðoya Røktarheim er m.a. ásett í §3, at ”*Leiðslan fyri stovnin er eitt stýri við 9 limum, har *Fugloyar- og Svínoyar kommunur í felag velja 1 lim, *Mikladals-, Húsar- og Kunoyar kommunur í felag velja 1 lim, *Viðareiðis kommuna velur 1 lim, *Hvannasunds kommuna velur 1 lim, og *Klaksvíkar Kommuna velur 5 limir. Limirnir verða valdir beinanvegin aftan á hvørt kommunuval. Fyri hvønn lim verður valt persónligt varafólk.*

Sostatt verður býráðið – um tað tekur undir við gjørdu avtaluni og siðvenjuni millum fyrrv. Svínoyar Kommunu og Fugloyar Kommunu – at velja ein lim og ein tiltakslim aftrat í stýrið fyri Norðoya Røktarheim, samstundis sum Fugloyar Kommuna velur limin í nevndina fyri Norðoya Vistarheim.

Lutfallið millum teir báðar valbólkarnar – meirilutan og minnilutan – er hetta:

	Lutfallið, dividerað við 1, 2, 3 … o.s.fr.			
Meirilutin (6 býráðslimir)	6	3	2	1,5
Minnilutin (5 býráðslimir)	5	2,5	1,67	1,25

Sostatt fellur hesin 6. limurin í stýrinum fyri Norðoya Røktarheim til minnilutan í býráðnum.

Klaksvíkar Býráð skal sostatt velja 6 limir og 6 varalimir.

Býráðsins samtykt:

Limir:		Varalimir:	
1.	Karl Heri Joensen	1.	Sven Dahl
2.	Gunvør Sigurðsson	2.	Hans Sylvian Jacobsen
3.	Tummas Lervig	3.	Hákun Dam
4.	Jan Gardar	4.	Jóhanna Christiansen
5.	Heidi Jacobsen	5.	Herfrí J. Sørensen
6.	Berit Norðoy	6.	Frida Marsten

Í sambandi við samanleggingina við Mikladals Kommunu skal ískoytandi upplýsast, at Mikladals, Húsar og Kunoyar kommunur í felag eiga ein lim + varalim, og er helst mest praktiskt at lata tær báðar kommunurnar, Húsar og Kunoy, um at velja hendan limin + varalimin í felag uttan at Klaksvík ger sín rætt her galdandi. Mælt verður til tað.

2013/032.
12/01162 Val av limum í nevndina fyri stovnin Norðoya Vistarheim, 2013-2016

Frágreiðing um málið:
Í reglugerðini fyri stovnin Norðoya Vistarheim er m.a. ásett í §3, at ”*Nevndin fyri stovnin er ”Nevndin fyri Norðoya Ellis- og Vistarheim”, sum er vald soleiðis: *4 limir fyri Klaksvíkar Kommunu, *1 limur fyri Kunoyar, Mikladals- og Húsa kommunur, *1 limur fyri Viðareiðis og Hvannasunds kommunur og *1 limur fyri Fugloyar og Svínoyar kommunur. Nevndin verður vald 4. hvørt ár aftan á býráðsval*”.

Klaksvíkar Kommuna skal velja 4 limir í nevndina.

Býráðsins samtykt:

Limir:		Varalimir:	
1.	Hergerð Joensen	1.	Sigrun Skálagarð

2.	Eyðgunn J. Samuelsen	2.	Hansa Nybo
3.	Erik Andreasen	3.	Bjarne Nielsen
4.	Bárður Lydersen	4.	Ruth Johannesen

2013/033.
12/01162 Val av limum og varalimum í nevndina fyri sjálvsognarstovnin Mylnuhúsið, 2013-2016

Frágreiðing um málið:
Í reglugerðini fyri sjálvsognarstovnin Mylnuhúsið er ásett í §3, at ”*Stovnurin verður stjórnaður av eini fimm-mannanevnd. Klaksvíkar Býráð velur 3 limir og 3 varalimir fyri hesar. Hinir báðir limirnir og varalimir teirra verða valdir av og millum foreldrini, sum hava børn á stovninum. Valini eru fyri valskeið býráðsins. Um eitt av foreldraumboðunum ikki longur hevur barn sítt á stovninum, verður annað umboð at velja innan 14 dagar frá tí, at barnið fór av stovninum.*
2. stk. Nevndin skipar seg sjálv við formanni, næstformanni og møguligum kassameistara.
3. stk. Klaksvíkar Býráð og foreldrini skulu hava valt síni umboð í nevndina í seinasta lagi 2 mánaðar eftir at býráðsval hevur verið. Klaksvíkar Kommuna skal hava boð um beinanvegin, hvør er valdur í nevndina, og hvussu hon hevur skipað seg”.

Sostatt skal býráðið velja 3 limir og 3 varalimir.

Býráðsins samtykt:

Limir:		Tiltakslimir:	
1.	Beinta Klakstein	1.	Birna Joensen
2.	Karl Martin Samuelsen	2.	Ella Heinesen
3.	Anna Maria Joensen	3.	Jan Gardar

2013/034.
12/01162 Val av limum í nevndina fyri Dr. Margrethu Barnagarð, 2013-2016

Frágreiðing um málið:
Reglugerðin fyri Dr. Margrethu Barnagarð, §3, sigur, at ”*Sjálvsognarstovnurin verður stjórnaður av eini seks-mannanevnd. Nevndarvalið fylgir valskeiðnum hjá bý- / bygdarráðnum.*
*Nevndin er samansett soleiðis: *Bý- og bygdaráðið velur ein lim, *2 limir vera valdir av og millum foreldrini, sum hava børn á stovninum. Foreldraumboðini kunnu bert vera í nevndini so leingi tey hava børn á stovninum og vera annað / onnur umboð at velja ístaðin so skjótt foreldraumboðini ikki longur hava børn á stovninum, *Nevndin í KFUM&K, Klaksvík, velur tríggjar nevndarlimir*”.

Sostatt skal býráðið velja eitt umboð í nevndina.

Býráðsins samtykt:

Limur:		Varalimur:	
1.	Jóhann Lützen	1.	Signhild V. Johannesen

2013/035.
12/01162 Val av limum og tiltakslimum í skattakærunevndina fyri Norðoya øki, 2013-2016

Frágreiðing um málið:

Kommunustýrisskipan býráðsins, §31, 1. petti, ásetur, at ”*Skattakærunevndin hevur 4 limir og 4 tiltakslimir úr Klaksvíkar kommunu, sbrt. kunngerð nr. 8 frá 5. februar 2001 um val av limum í kommunalu skattakærunevndirnar*”.

Býráðsins samtykt:

Limir:		Tiltakslimir:	
1.	Markus Tummas Jacobsen	1.	Svanhild Isaksen
2.	Per Andrew Olsen	2.	Margee Dam
3.	Erling Petersen	3.	Símun á Høvdanum
4.	Ruth Johannesen	4.	Auðunn Konráðsson

2013/036.
12/01162 Val av limum í nevndina fyri Klaksvíkar Tónlistaskúla, 2013-2016

Frágreiðing um málið:
Reglugerðin fyri Klaksvíkar Tónlistaskúla, §2, sigur m.a., at nevndin, sum stjórnar skúlanum, er soleiðis manna: *”*eitt býráðsumboð, sum er formaður í nevndini, verður valt av býráðnum aftan á hvørt býráðsval, galdandi fyri valskeiðið, *eitt foreldraumboð verður valt av foreldrunum við byrjan av hvørjum skúlaári. Skúlin skipar fyri hesum vali. *Triði limurin verður valdur av býráðnum eftir tilmæli frá leiðaranum av skúlanum*”.
Sostatt skal býráðið sjálvt velja eitt umboð, sum verður formaður í nevndini, og so eitt umboð fyri tónleikalívið í býnum, eftir tilmæli frá leiðaranum fyri skúlan.

Býráðsins samtykt:
Býráðsins umboð: Signhild V. Johannesen
Umboð eftir tilmæli frá leiðaranum á skúlanum: Heri Ellingsgaard

2013/037.
12/01162 Val av kommunustýrisumboðum í skúlastýrir, 2013-2016

Frágreiðing um málið:
Fólkaskúlalógin ásetur í §50, at eitt skúlastýri skal verða valt til hvønn sjálvstøðugan skúla í kommununi.

Galdandi fyri skúlarnar í Klaksvík:
Stk. 2. Í skúlum, sum í minsta lagi hava 20 næmingar og 2 lærarar smb. § 55 stk. 1, eru limir tess:

1. 2 kommunustýrisumboð, ið verða vald av kommunustýrinum,
2. 3 foreldraumboð, ið skulu verða vald millum teirra, ið hava foreldramyndugleikan yvir teimum børnum, sum eru skrivað inn í skúlan,
3. skúlaleiðarin,
4. 1 umboð fyri lærararnar og hini samstarvsfólkini, ið skulu verða vald av samstarvsfólkum skúlans.

Galdandi fyri Skúlan í Mikladali:
Stk. 3. Í skúlum, ið hava færri enn 20 næmingar og bert ein lærara, eru limir tess:

1. skúlaleiðarin,
2. tvey foreldraumboð,

3. eitt komunustýrisumboð og eitt varaumboð, sum tekur sæti í skúlastýrinum, tá ið kommunustýrisumboðnum berst frá.

Býráðsins samtykt fyri Skúlan við Ósánna (§50, stk. 2):
1. Sven Dahl
2. Anna Maria Joensen

Býráðsins samtykt fyri Skúlan við Ziskatrød (§50, stk. 2):
1. Óluva Klettskarð
2. Markus í Norðnástovu

Býráðsins samtykt fyri Mikladals/Trøllanesar Skúla (§50, stk. 3):

Limur:	Varalimur:
1. Nikolina Olsen	1. Petur Martin Hansen

2013/038.
12/01162 Val av limi og varalimi í nevndina fyri Tekniska Skúlan í Klaksvík, 2013-2016

Frágreiðing um málið:
Í viðtøkum Tekniska Skúlans í Klaksvík, sum er ein sjálvsognarstovnur, er ásett í §2, at ”*við sjálvsognarstovnin verður valt eitt stýri. Stýrið hevur 6 limir, sum verða valdir fyri 4 ár – valskeiðið gongur frá 1. apríl til og við 31. mars eftir kommunuval. Fyri hvønn stýrislim verður ein varalimur valdur.*
Stk. 2. Limirnir verða valdir soleiðis: (a) Viðkomandi yrkisfeløg á arbeiðsmarknaðinum velja tilsamans 4 limir við javnstórari umboðan av arbeiðsgevarum og løntakarum. Føroya Handverksmeistarafelag velur 2 limir og Føroya Handverkarafelag 2 limir. (b) Klaksvíkar Kommuna, har skúlin hoyrir heima, velur 1 lim. (c) Starvsfólkini á skúlanum velja 1 lim”.

Sostatt skal býráðið velja 1 lim og 1 varalim.

Býráðsins samtykt:

Limur:	Varalimur:
1. Jógvan Skorheim	1. Steinbjørn O. Jacobsen

2013/039.
12/01162 Val av limum og tiltakslimum í nevndina fyri sjálvsognarstovnin Húsarhaldsskúla Føroya, 2013-2016

Frágreiðing um málið:
Sambært reglugerð fyri Húsarhaldsskúla Føroya skal Klaksvíkar Býráð velja 2 limir og 2 tiltakslimir í nevndina fyri skúlan. Nevndin hevur íalt 5 limir. Húsmøðrafelagið velur 2 og Kvinnusamskipan Føroya velur 1 lim.

Sostatt skal býráðið velja 2 limir og 2 varalimir:

Býráðsins samtykt:

Limir:	Varalimir:
1. Hanna Jacobsen	1. Signy Hansen

2. Jóhanna Christiansen 2. Berit Norðoy

2013/040.
12/01162 Val av limi og varalimi í nevndina fyri Ferðavinnuna í Norðoyggjum, 2013-2016

Frágreiðing um málið:
Tað stendur ikki í viðtøkunum fyri Ferðavinnuna í Norðoyggjum, at býráðið skal velja 1 lim í nevndina, men hetta er eitt krav frá Ferðaráð Føroya fyri at stuðla. Nevndin telur íalt 5 limir, og rætt er helst eisini at velja ein tiltakslim. Sambært siðvenju hevur hesin limurin verið form./forkv. í Mentanarnevndini, meðan varalimurin hevur verið næstform./næstforkv. í Mentanarnevndini.

Sostatt skal býráðið velja 1 lim og 1 varalim.

Býráðsins samtykt:
Limur: Varalimur:
1. Signhild V. Johannesen 1. Jóhann Lützen

2013/041.
12/01162 Val av umboði og varaumboði í umboðsráðið fyri Norðoya Fornminnasavn, 2013-2016

Frágreiðing um málið:
Í viðtøkunum fyri Norðoya Fornminnasavn er m.a. ásett í §5, at ”*allar kommunur í Norðoyggjum eru umboðaðar í savninum gjøgnum eitt umboðsráð, sum yvirfyri stjórnini og savninum kunnu reisa síni áhugamál viðvíkjandi savnsvirkseminum. Hetta umboðsráð verður valt soleiðis: Hvør kommuna í Norðoyggjum velur eitt umboð við eykaumboð í ráðið. Umboðini verða vald beint eftir, at bygda- og býráðsval hava verið, og sita tey valskeiðið út*”.

Sostatt skal býráðið velja eitt umboð og eitt varaumboð í umboðsráðið.

Býráðsins samtykt:
Umboð: Varaumboð:
1. Heini Mohr 1. Andras Joensen

2013/042.
12/01162 Val av limum í byggibólk fyri Skúlan á Ziskatrød

Frágreiðing um málið:
Byggibólkur fyri Skúlan á Ziskatrød, sum varð valdur 18. oktober 2011, verður at dagføra samsvarandi nýggja valskeiðnum.

Byggibólkurin hevur verið soleiðis mannaður: formaðurin í Mentanarnevndini, umboð fyri mentanardeildina, umboð fyri Skúlan á Ziskatrød, umboð fyri Teknisku Umsiting og formaðurin í skúlastýrinum á Ziskatrød

Býráðsins samtykt:
1. Signhild V. Johannesen, forkv. í Mentanarnevndini
2. Dávur Winther, mentanardeildin

3. Hans Fróði Hansen, tekniska umsiting
4. Óla Jákup Joensen, skúlastjóri
5. Formaðurin í skúlastýrinum á Ziskatrøð

2013/043.
12/01162 Val av limum og varalimum í umboðsnevndina fyri interkommunala elfelagið SEV, 2013-2016

Frágreiðing um málið:
Í viðtøkunum fyri Elfelagið SEV er m.a. ásett í § 4, at "*Til at hava yvirstjórn í felagsins viðurskiftum verður á aðalfundinum vald ein nevnd sambært stk. 2. Í nevndina verða valdir sjey limir soleiðis, at Vága, Streymoyar, Eysturoyar, Norðoya og Sandoyar sýslur hvør velja ein, Suðuroyggin ein og Tórshavnar kommuna ein nevndarlim. Valið fer fram á tann hátt, at limakommunurnar í hvørjum øki sær seta upp valevnir og atkvøða um hesi. Um nevndarlimur flytur úr økinum, har hann er valdur, tekur varalimurin við, og nýggjur varalimur verður valdur*".

Sostatt er tað í hesum føri upp til býráðið at samtykkja at mæla til ein lim/varalim, men avgerðin um hesi viðurskifit liggur tó í hondunum á aðalfundinum hjá SEV, sum seinast – tá ið valt varð – varð hildin í februar mánað 2009, og har borgarstjórin vegna kommununa skeyt upp tað, sum býráðið hevði samtykt.

Sostatt skal býráðið velja 1 lim og 1 varalim.

Býráðsins samtykt:

Limur:	Varalimur:
1. Steinbjørn O. Jacobsen	1. Katrin Næs

2013/044.
12/01162 Val av kommunuumboði í IRF, 2013-2016

Frágreiðing um málið:
Sambært viðtøkum IRF's skal veljast eitt kommunuumboð í felagsskapin, og skal hesin vera býráðslimur.
4. grein í viðtøkunum: "*lutaeigararnir eru ognarar í felagnum í mun til íbúgvaratalið í kommununi* ..."

Harumframt skal tiltakslimur veljast.

Býráðsins samtykt:

Limur:	Tiltakslimur:
1. Kristian Eli Zachariasen	1. Signhild V. Johannesen

2013/045.
12/01162 Val av umboði í Kommunusamskipan Føroya (KSF), 2013-2016

Frágreiðing um málið:
Í viðtøkunum hjá KSF, §4, stk. 2, er ásett: "Til at taka avgerð á aðalfundi velur hvørt kommunustýri eitt umboð. Aðrir kommunustýrislimir hava rætt at møta og taka orðið á aðalfundi".

Sostatt skal veljast eitt umboð fyri býráðið, og verður í hesum føri mælt til at velja borgarstjóran

Býráðsins samtykt:
Jógvan Skorheim

2013/046.
12/01162 Val av limum í hýruvognsnevnd, 2013-2016

Frágreiðing um málið:
Sambært grein 1 í kunngerð nr. 129 frá 28. des. 2010 um hýruvognsreglugerð í Klaksvíkar Kommunu skal loyvi til hýruvognskoyring gevast av hýruvognsnevnd mannað av umboðum fyri býráðið og løgregluna.

Veljast skulu tríggir býráðslimir í hýruvognsnevndina.

Býráðsins samtykt:
1. Kristian Eli Zachariasen
2. Jóhann Lützen
3. Atli S. Justinussen

2013/047.
12/01162 Val av umboðum býráðsins í nevndina fyri Klaksvíksgrunnin, 2013-2016

Frágreiðing um málið:
Sambært viðtøkunum fyri Klaksvíksgrunnin, § 4-5, er nevndin fyri grunnin, sum skipar seg sjálv, mannað við einum umboði fyri Landsstýrið (valt fyri 3 ár), einum fyri Klaksvíkar Býráð (valt fyri 2 ár) og einum fyri Føroyagrunnin (valt fyri 2 ár).

Sostatt skal býráðið velja 1 lim.

Býráðsins samtykt:
1. Atli S. Justinussen

2013/048.
12/01162 Val av limum í grunnin Mentanarhús í Klaksvík, 2013-2016

Frágreiðing um málið:
Sambært grein 3 í samtyktunum fyri grunnin Mentanarhúsið í Klaksvík verður grunnurin umsitin av einum stýri við 6 limum, sum verða valdir soleiðis: Klaksvíkar Sjónleikarafelag velur ein lim, Norðoya Listafelag velur ein lim, Nevndin fyri Klaksvíkar Tónlistaskúla velur ein lim, Norðurlandahúsið í Føroyum velur ein lim, og Klaksvíkar Býráð velur tveir limir.

Veljast skulu tveir limir í stýrið.

Býráðsins samtykt:
1. Signhild V. Johannesen

2. Gunvá við Keldu

2013/049.
12/01162 Val av limum í nevndina fyri grunnin Spinnaríið, 2013-2016

Frágreiðing um málið:
Sambært grein 5 í viðtøkunum fyri grunnin Spinnaríið er grunnurin sjálvsognarstovnur, sum verður stjórnaður av eini nevnd, ið telur tríggjar limir, og sum verður vald sambært hesari viðtøku. Nevndarlimirnir verða valdir fyri eitt 4 ára tíðarskeið hvørja ferð og kunnu verða afturvaldir. Nevndin verður vald soleiðis: Klaksvíkar Handverkarafelag velur ein lim, Ferðavinnan í Norðoyggjum velur ein lim, og Klaksvíkar Kommuna velur ein lim. Haraftrat fáa báðir leigararnir í húsinum, Knitting Faroes Sp/f og bátasavnið Samognin, hvør sín lim í nevndina, galdandi í tvey ár fram (samtykt í býráðnum 27. sept. 2011), tá ið hesir báðir nevndarsessirnir fella burtur.

Sostatt skal veljast eitt kommunalt umboð í nevndina.

Býráðsins samtykt:
Eyðbjørn Poulsen

2013/050.
12/01162 Val av limi í nevndina fyri Sjálvsognarstovnin Lestraríbúðir í miðbýnum í Klaksvík

Frágreiðing um málið:
Sambært grein 4 í viðtøkunum fyri Lestraríbúðir í miðbýnum í Klaksvík er grunnurin sjálvsognarstovnur, sum verður stjórnaður av eini nevnd, ið telur fýra limir. Nevndarlimirnir verða valdir fyri eitt 4 ára tíðarskeið hvørja ferð og kunnu verða afturvaldir. Nevndin verður vald soleiðis: Tekniski Skúlin í Klaksvík velur ein lim, Húsarhaldsskúli Føroya velur ein lim, umboð fyri tey búsitandi velja ein lim, og Klaksvíkar Kommuna velur ein lim.

Veljast skal ein limur.

Býráðsins samtykt:
Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur

2013/051.
12/01178 Vardir bústaðir til fólk við lættari menningartarni - viðtøkur fyri sjálvsognarstovnin

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagfest 9. jan. 2013, har greitt verður frá verkætlanini um vardar bústaðir til fólk við lættari menningartarni. Harumframt verður víst til *Viðtøkur fyri Sjálvsognarstovnin við Heygavegin í Klaksvík*, dagf. 14. jan. 2013. Endamál sjálvsognarstovnsins er at útvega og reka, so bíliga sum til ber, tíðarhóskandi bústaðir til menningartarnað.

Tilmæli:
Mælt verður til at taka undir við uppskotnu viðtøkunum fyri grunnin, dagfestar 14. jan. 2013.

SoN 16. jan. 2013: Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini, dagfest 9. januar 2013, og mælir býráðnum til at velja tveir býráðslimir í nevndina fyri sjálvsognarstovnin, umboðandi ávíkavist minnilutan og meirilutan í býráðnum.

FíN 22. jan. 2013: Nevndin tekur undir við SoN 16. jan. 2013.

Býráðsins samtykt:
Samtykt

2013/052.
12/01162 Val av limi í nevndina fyri Sjálvsognarstovnin við Heygavegin í Klaksvík

Frágreiðing um málið:
Sambært grein 4 í viðtøkunum fyri Sjálvsognarstovnin við Heygavegin er grunnurin sjálvsognarstovnur, sum verður stjórnaður av eini nevnd, ið telur fimm limir. Klaksvíkar Kommuna velur tveir limir, Almannaverkið velur ein lim, Bólkurin av brúkarum búsitandi í ognini velur ein lim, og Fíggingarstovnurin, sum fíggjar verkætlanina, velur ein lim.

Veljast skulu tveir limir.

Býráðsins samtykt:
Óluva Klettskarð
Eyðstein Ó. Poulsen

2013/053.
12/01162 Val av limi í nevndina fyri Vinnuliga útbúgvingargrunnin í Klaksvíkar Kommunu, 2013-2016

Frágreiðing um málið:
Klaksvíkar Býráð góðkendi á býráðsfundi 1. mai 2012 viðtøkurnar fyri grunnin Vinnuligi útbúgvingargrunnurin í Klaksvíkar Kommunu. Grunnurin er sjálvsognarstovnur, ið verður stjórnaður av nevnd við trimum limum, ið verða tilnevndir samsvarandi viðtøkum. Nevndin skipar seg sjálva við formanni. Nevndarlimir verða valdir fyri 4 ár í senn eftir býráðsval og kunnu veljast aftur. Fyri framtíðina velja hesi ávikavist ein lim og ein varalim: Klaksvíkar Kommuna, stjórin fyri Tekniska Skúla í Klaksvík umboðandi Klaksvíkar Sjómansskúla og stjórin fyri Vinnuháskúlan.

Veljast skal ein limur og ein varalimur.

Býráðsins samtykt:

Limur:	Varalimur:
1. Kristian Eli Zachariasen	1. Jórun Høgnesen

2013/054.
12/01162 Uppnevning av grindaformonnum fyri Klaksvíkar hvalvág, 2013-2014

Frágreiðing um málið:

Sambært grein 4 í grindakunngerðini (nr. 48 frá 08.04.1998 og sum broytt í nr. 72 frá 06.06.2011) verða til hvørja hvalvág uppnevndir fýra menn til grindaformenn umframt tveir tiltaksmenn. Hesir verða sambært stk. 3 í somu grein uppnevndir av sýslumanninum eftir ummæli frá býráðnum fyri fimm ár.
Galdandi uppnevning av grindaformonnum fyri Klaksvíkar hvalvág er galdandi fram til desember 2014, men skriv, dagfest 10. jan. 2013, er komið frá Sýslumanninum fyri Norðoya Sýslu við áheitan um at endurskoða uppnevningina, tí nakrir grindaformenn hava sagt seg frá. Sýslumaðurin ber í skrivinum fram ynski um, at niðanfyrinevndu persónar veðra uppnevndir til grindaformenn og tiltaksmenn restina av skeiðinum, tvs. til desember 2014:

Grindaformenn fyri Klaksvíkar hvalvág:
Knút Olsen, 700 Klaksvík
Óli Karl Olsen, 700 Klaksvík
Andras Joensen, 700 Klaksvík
Bjarti Højbro, 700 Klaksvík

Tiltaksmenn:
Dan Hjelm, 700 Klaksvík
Jógvan Z. Dahl, 700 Klaksvík

Býráðsins samtykt:
Samtykt

2013/055.
12/01162 Val av limum í Starvsnevnd Føroysku Havna

Frágreiðing um málið:
Starvsnevnd Føroysku Havna hevur ikki verið formliga vald á fyrsta býráðsfundi tey seinastu valskeiðini, men hetta er møguliga vert at taka upp til viðgerðar. Verandi limir í nevndini eru umsitingarpersónar.

Býráðsins samtykt:

Limur:	Varalimur:
1. Meinhard Petersen	1. Jógvan Z. Dahl

2013/056.
13/00014 Reglugerð um fulltrú til kommunalar bindingar, dagføring 2013

Frágreiðing um málið:
Í sambandi við at nýggjur borgarstjóri er valdur, og nýggjur kommunusjóri er settur, skal reglugerðin um fulltrú til kommunalar bindingar dagførast. Sí dagførda reglugerð.

FíN 22. jan. 2013: Nevndin tekur undir við uppskotnu dagføringini av reglugerðini.

Býráðsins samtykt:
Samtykt

2013/057.
12/01066 Byggisamtyktarbroyting - kærufreist úti - A5-D39

Frágreiðing um málið:

Í samband við bygging av vardum íbúðum við Mylnutún samtyktu Byggi- og Býarskipanarnevndin og Tekniska Nevnd í oktober 2012 at leggja omanfyri nevnda uppskot um regulering fram til almenna hoyring. Hoyringsfreistin var úti 4. januar 2013, og ongin kæra er móttikin.

Tilmæli:
Mælt verður til, at fyriliggjandi uppskot til broyting av byggisamtyktini verður samtykt og sent landstýrismanninum til góðkenningar.

BBN 14. jan. 2013: Nevndin tekur undir við tilmæli frá teknisku umsiting, dagfest tann 8. januar 2013.

TN 16. jan. 2013: Málið verið til kunning.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt

2013/058.
12/00805 Byggisamtyktarbroyting - kærufreist úti - A15-B6

Frágreiðing um málið:
Vísandi til viðgerðina av máli nr. 09/00912 (Bygging á Norðborg-økinum) samtykti býráðið á fundi 11. september 2012 omanfyri nevnda uppskot um byggisamtyktarbroyting av matr. nr. 91 í Klaksvík. Málið hevur ligið frammi til almenna hoyring til 4. januar 2013, og ongin kæra er móttikin.

Tilmæli:
Mælt verður til, at fyriliggjandi uppskot til broyting av byggisamtyktini verður samtykt og sent landstýrismanninum til góðkenningar.

BBN 14. jan. 2013: Nevndin tekur undir við tilmæli frá teknisku umsiting, dagfest tann 8. januar 2013.

HaVN 15. jan. 2013: Málið verið til kunning.

TN 16. jan. 2013: Málið verið til kunning.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt

2013/059.
12/00807 Byggisamtyktarbroyting - kærufreist úti - A4-D40

Frágreiðing um málið:
Í samband við viðgerðina av máli nr. 12/00011 (Keyp av matr. nr. 807c í Klaksvík) samtykti býráðið á fundi 20. mars 2012 uppskot um at útleggja part av matr. nr. 807c til fríøki. Málið hevur ligið frammi til almenna hoyring til 4. januar 2013, og ongin kæra er móttikin.

Tilmæli:

Mælt verður til, at fyriliggjandi uppskot til broyting av byggisamtyktini verður samtykt og sent landstýrismanninum til góðkenningar.

BBN 14. jan. 2013: Nevndin tekur undir við tilmælið frá teknisku umsiting dagfest tann 8. januar 2013

TN 16. jan. 2013: Málið verið til kunning.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt

FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI

2013/063.
12/01116 Hølisviðurskifti í Badmintonhøllini - HSF

Frágreiðing um málið:
Í skrivi frá umsitingini, dagfest 11. jan. 2013, verður greitt frá, at Hondbóltsambandið hevur noktað fyri, at hondbóltsdystir verða spældir í Badmintonhøllini, tí har lekur niður úr loftinum. Hondbóltsambandið er sinnað at geva loyvi til spæl, treytað av at bráðneyðugar fyribilsloysnir verða gjørdar, so vatn ikki kemur inn spæliøkið og onnur viðuskifti, s.s. skiftingarrúm til dómararnar eisini verða gjørd. Víst verður til skrivið frá umsitingini, 11. jan. 2013.

Tilmæli:
Mælt verður til
1) *at arbeiðið sambært tilboði frá veitara verður gjørt sum skjótast*
2) *at Norðoya Sparikassi og Tryggingin verða kunnað um hesar fyribils ábøtur*
3) *at arbeiðið verður fíggjað av "Stadionøkinum" – um ikki serlig avseting verður gjørd, sum ber allar tær umtalaðu umvælingarnar, ætlanir eru um.*

MeN 15. jan. 2013: Ein meiriluti, Signhild V. Johannesen, Jóhann Lützen, Óluva Klettskarð, tekur undir við tilmæli frá umsitingini 11. januar 2013 – og mælir til, at arbeiðið verður sett í gongd eftir aðru viðgerð í býráðnum av málinum. Ein minniluti, Gunvá við Keldu mælir til, at vegna tað, at býráðið ikki eigur høllina, at Norðoya Sparikassi ber kostnaðin av umvælingunum smb. tilmælinum 11. januar 2013.

TN 16. jan. 2013: Ein meiriluti, Steinbjørn O. Jacobsen, Jóhann Lützen og Kristian Eli Zachariasen, tekur undir við meirilutanum í MeN. Ein minniluti, Gunvá við Keldu, tekur undir við minnilutanum í MeN. Ein annar minniluti, Elsebeth M. Gunnleygsdóttur, tekur støðu í býráðnum.

FíN 22. jan. 2013: Ein meiriluti, Jógvan Skorheim, Óluva Klettskarð og Eyðstein Poulsen, tekur undir við at játta henda pening, um tørvur er á hesum, eftir at Tryggingarfelagið Føroyar hevur goldið fyri tryggingarskaðarnar. Ein minniluti, Atli S. Justinussen, tekur støðu í býráðnum.

Býráðsins samtykt:
Herfrí J. Sørensen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Ein meiriluti, Steinbjørn O. Jacobsen, Óluva Klettskarð, Jóhann Lützen, Signhild V, Johannesen, Kristian Eli Zachariasen og Jógvan Skorheim, tekur undir við tilmælinum dagfest 11. jan. 2013.
Ein minniluti, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur og Gunvá við Keldu, tók ikki undir við tilmælinum.
Eyðstein Ó. Poulsen og Atli S. Justinussen atkvøddu blankt.

2013/064.
11/00042 Klaksvíkar Badmintonhøll - fíggjarviðurskifti *– eykajáttan, seinna viðgerð*

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagfest 14. jan. 2013, har greitt verður frá gongdini í málinum.

Tilmæli:
Vísandi til omanfyristandandi og viðløgdu skjøl, leggur umsitingin – í samráð við politisku leiðsluna – hetta mál fyri avvarðandi nevndir og býráðið til viðgerðar við tilmæli um seinnu samtykt eftir tí leisti og skipan, sum er útgreinað í hesum tilmæli, herundir at býráðið samtykkir fyriliggjandi:

(a) keyp og fígging av KÍ-høllini og Badmintonhøllini – fylgiskjal I
(b) viðtøkur fyri hallarnevndina – nú broytt at galda fyri hallarleiðsluna – fylgiskjal II
(c) rakstrar- og umvælingarætlan – fylgiskjal III
(d) broytingar av samtyktu fíggjarætlan býráðsins – fylgiskjal IV

MeN 15. jan. 2013: Ein meiriluti, Signhild V. Johannesen, Jóhann Lützen, Óluva Klettskarð, tekur undir við tilmæli frá umsitingini 14. januar 2013 – tó verður umvælingarætlanin smb. skjali III at taka upp aftur seinni. Ein minniluti, Gunvá við Keldu, heldur seg til býráðsviðtøkuna í hesum máli 11. desember 2012.

TN 16. jan. 2013: Ein meiriluti, Steinbjørn Jacobsen, Jóhann Lützen og Kristian Eli Zachariasen, tekur undir við tilmælinum, dagf. 14. januar 2013. Ein minniluti, Gunvá við Keldu og Elsebeth Gunnleygsdóttur, heldur seg til býráðsviðtøkuna í hesum máli, dagfest 11. desember 2012.

FíN 22. jan. 2013: Ein minniluti, Jógvan Skorheim og Óluva Klettskarð, tekur undir við málinum, sum tað fyriliggur í løtuni. Ein annar minniluti, Atli S. Justinussen og Eyðstein Poulsen, tekur støðu í býráðnum.

Býráðsins samtykt:
Mál nr. 64 og 65 (KÍ-høllin) avgreidd undir einum.
Herfrí J. Sørensen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Tilmælið hjá meirilutanum í Mentanarnevndini samtykt við 7 atkvøðum fyri (Kristian Eli Zachariasen, Signhild V. Johannesen, Óluva Klettskarð, Jóhann Lützen, Jógvan Skorheim og Atli S. Justinussen) og 3 ímóti (Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, Gunvá við Keldu og Eyðstein Ó. Poulsen).

2013/065.
12/00901 KÍ-høllin – *eykajáttan, seinna viðgerð*

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagfest 14. jan. 2013, har greitt verður frá gongdini í málinum.

Tilmæli:
Vísandi til omanfyristandandi og viðløgdu skjøl, leggur umsitingin – í samráð við politisku leiðsluna – hetta mál fyri avvarðandi nevndir og býráðið til viðgerðar við tilmæli um seinnu samtykt eftir tí leisti og skipan, sum er útgreinað í hesum tilmæli, herundir at býráðið samtykkir fyriliggjandi:

(a) keyp og fígging av KÍ-høllini og Badmintonhøllini – fylgiskjal I
(b) viðtøkur fyri hallarnevndina – nú broytt at galda fyri hallarleiðsluna – fylgiskjal II
(c) rakstrar- og umvælingarætlan – fylgiskjal III
(d) broytingar av samtyktu fíggjarætlan býráðsins – fylgiskjal IV

MeN 15. jan. 2013: Ein meiriluti, Signhild V. Johannesen, Jóhann Lützen, Óluva Klettskarð, tekur undir við tilmæli frá umsitingini 14. januar 2013 – tó verður umvælingarætlanin smb. skjali III at taka upp aftur seinni. Ein minniluti, Gunvá við Keldu, heldur seg til býráðsviðtøkuna í hesum máli 11. desember 2012.

TN 16. jan. 2013: Ein meiriluti, Steinbjørn Jacobsen, Jóhann Lützen og Kristian Eli Zachariasen, tekur undir við tilmælinum, dagf. 14. januar 2013. Ein minniluti, Gunvá við Keldu og Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, heldur seg til býráðsviðtøkuna í hesum máli, dagfest 11. desember 2012.

FíN 22. jan. 2013: Ein minniluti, Jógvan Skorheim og Óluva Klettskarð, tekur undir við málinum, sum tað fyriliggur í løtuni. Ein annar minniluti, Atli S. Justinussen og Eyðstein Poulsen, tekur støðu í býráðnum.

Býráðsins samtykt:
Mál nr. 64 (Badmintonhøllin) og 65 avgreidd undir einum.
Herfrí J. Sørensen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Tilmælið hjá meirilutanum í Mentanarnevndini samtykt við 7 atkvøðum fyri (Kristian Eli Zachariasen, Signhild V. Johannesen, Óluva Klettskarð, Jóhann Luzen, Jógvan Skorheim og Atli S. Justinussen) og 3 ímóti (Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, Gunvá við Keldu og Eyðstein Ó. Poulsen).

Fundurin lokin kl. 21.00

_____
(undirskrift skrivarans)

Jógvan Skorheim, borgarstjóri	*Steinbjørn O. Jacobsen*
Óluva Klettskarð	*Jóhann Lützen*
Signhild V. Johannesen	*Kristian Eli Zachariasen*
Gunvá við Keldu	*Elsebeth M. Gunnleygsdóttur*
Eyðstein Ó. Poulsen	*Atli S. Justinussen*
Herfrí J. Sørensen	